FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. mai 2020
J. nr.: 20/00200

Svar uppá spurning nr. 70/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingskvinnu, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, viðvíkjandi vinningsbýti.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvan pening hevur TAKS móttikið í vinningsbýtisskatti í ávikavist 2016, 2017 og 2018?
2. Hvussu nógvan pening hevur TAKS endurrindað fyri skatt av vinningsbýti í ávikavist 2016, 2017 og 2018, og eftir hvørjum reglum varð hesin peningurin endurrindaður ?
3. Hvussu nógvur peningur er endurrindaður útlendskum ognarluti í ávikavist 2016, 2017 og 2018?
4. Hvussu nógvan pening fekk landskassin inn fyri skatt av vinningsbýti í 2002, sum er fyrsta árið eftir, at lóg um skatting av kapitalvinningi varð viðtikin?
5. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta tiltøk í verk til tess at tryggja sær, at ein størri partur av vinningsbýtisskattinum kemur í landskassan?

Svar til spurning 1, 2 og 3
Inntøkurnar frá vinningbýtisskatti eru vaksnar nógv síðstu árini. Í alt var inntøka landsins 617 mió. kr. frá vinningsbýtisskatti árini 2016, 2017 og 2018.
Fyri at fyribyrgja dupulskatting og harvið óneyðugum skeiklingum eru Føroyar partur av fleiri dupultskattaavtalum, har avtala er gjørd um hvussu skattur skal linkast, tá fleiri lond krevja skatt av somu inntøku. Tí verður goldin vinningsbýtisskattur í Føroyum, endurgoldin sæmbært hesum avtalum til útlendingar.
Føroyska samfelagið hevur áhugað í, at útlendingar kunnu gera íløgur í Føroyum, og at føroyingar kunnu gera íløgur uttanlands, uttan at skulu rinda skatt fleiri ferðir av somu upphædd. Hetta tryggjar føroyingum atgongd til kapital og vitan samstundis sum føroyskar uppsparingar kunnu fáa størst møguligt avkast, her heima og uttanlands.

Talvan niðanfyri vísir inntøkur og útreiðslur av vinningsbýtisskatti, sum TAKS hevur havt árini 2016, 2017 og 2018. Í alt var hesi árini goldin 673 mió. kr. í vinningbýtisskatti, meðan TAKS endurrindaði knappar 57 mió. kr.

Reglurnar eru:

- Tá føroysk feløg og grunnar o.o. útluta vinningsbýti, hava tey skyldu at eftirhalda vinningsbýtisskatt. Víst verður til § 9 og § 15, stk. 1 í ll. nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi.
- Tá útlutað verður til likamligar persónar, skal eftirhaldast 35%.

- Tá útlutað verður til feløg og grunnar o.o., sum ikki er fult skattskyldug í Føroyum, skal eftirhaldast 18%.
- Tá útlutað verður til feløg og grunnar o.o., sum eru fult skattskyldug í Føroyum, verður eingin skattur eftirhildin.

Fyri at fáa endurrindaðan goldnan vinningbýtisskatt, skal talan vera um partaeigara, sum ikki er fult skattskyldugur í Føroyum og hevur heimstað í landið, sum hevur dupultskattavtalu við Føroyar.

Vanliga verður skattur endurrindaður eftir umsókn, men av praktiskum ávum avroknar Bakkafrost skattin av vinningbýti fyri TAKS, av tí, sum útlutað verður til partaeigarar heimahoyrandi í útlandinum.

Tá útlutað verður til feløg og grunnar o.o., sum eiga meir enn 10%, har tey sambært tvískattaavtalu hava rætt til at fáa allan skattin aftur, kann søkjast um "afturrindan" áðrenn útlutan, soleiðis at hesin skattur ikki kemur inn til TAKS at venda. Hetta er til dømis galdandi í norðurlendsku tvískattaavtaluni. Tá skula allar váttanir og góðkenning frá TAKS fyriliggja áðrenn útlutan. Hesum tekur útlutandi felag sær av.

Av omanfyri nevndu orsøkum er samlaða linkingin í skatti væl meira enn tær knøppu 57 mió. krónurnar, sum standa í talvuni niðanfyri. Leggjast kann afturat, at føroyingar hava eisini vinning av íløgum uttanlands, sum koma til skattingar í Føroyum.

Vinningsbýtisskattur	**2016**	**2017**	**2018**	**í alt**
Vinningsbýti 35%	165.102	230.209	215.916	611.227
Vinningsbýti 18%	18.218	21.160	23.090	62.468
	183.320	**251.369**	**239.006**	**673.695**
Renta	308	207	94	609
Afturrindan	-11.813	-31.611	-13.191	-56.615
Total	**171.815**	**219.965**	**225.909**	**617.689**

Svar til spurning 4
Í 2002 komu 48 mió. kr. inn í vinningsbýtisskatti.

Svar til spurning 5
Grundreglan í norðurlendsku tvískattaavtaluni er, at lønmóttakarar rinda skatt í landinum har arbeitt verður, meðan kapitalvinningur verður skattaður har eigarin hevur heimstað.

Við norðurlendska tvískattasáttmálanum er fyri løntakarar tó undantak fyri fiskimenn og flogfólk. Tað merkir, at føroyingar, sum fiska ella flúgva í Norra og búgva í Føroyum, bert rinda skatt í Føroyum. Tað eru nógvir føroyskir fiskimenn, sum sigla við norskum fiskiskipum.

Vælferðartænastur eru skattafíggjaðar, og tað eru brúkararnir á staðnum, sum gjalda fyri tænasturnar. Norðurlendska dupultskattaavtalan brýtur við henda grundtanka. Hon ásetur, at løntakarar rinda skatt har, sum inntøkan verður forvunnin, og ikki har, ið skattgjaldarin býr. Í 2014 royndi undirritaði sum fíggjarmálaráðharri at fáa undirtøku millum norðurlendsku starvsfelagarnar, um at fáa hetta broytt, men uppskotið fekk kaldliga móttøku.

Avbjóðingin við skatti av vinningsbýti líggur í norðurlendsku tvískattaavtaluni. Eg dugi ikki at síggja, at undanfarna landsstýrið hevur gjørt nakra roynd at broyta norðurlendska tvískattasáttmálan hesum viðvíkjandi.

Út frá kaldligu móttøkuni av uppskotinum til broytingar í norðurlendsku tvískattaavtaluni tá, er sannlíkt at støðan er tann sama í dag.

Tí hava Føroyar bert ein møguleika, og tað er siga avtaluna upp. Vit hava ikki yvirlit yvir, hvørjar avleiðingar tað vildi fingið, men vit høvdu fingið nakað og mist nakað. Landsstýrimaðurin fer at kanna nærri fyrimunir og vansar við avtaluni og harvið eisini møguliga uppsøgn av norðurlendsku tvískattaavtaluni.

Fíggjarmálaráðið, 7. mai 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður